Jakob Jónsson, Kyndil:

# – Betra liðið vann

**Veteranurin hjá Kyndli, Jakob Jónsson, hevði ætlað sær greipuna í ár, men hann noyddist at staðfesta mikukvøldið, at VÍF var betra liðið, og tað var uppiborið, at vestmenningar vóru í finaluni**

STEYPAPRÁT

*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*



*Jacon Jónsson hjá Kyndli staðfesti eftir dystin, at tað var fult uppiborið, at VÍF vann seg í finaluna*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Spurdur, hvat gekk galið hjá Kyndli í dystinum mikukvøldið, segði Jakob Jónsson:

– Eg haldi, at vit tapa dystin longu í fyrra hálvleiki. Rókur kemur á vøllin fyri meg, og hann fær tvey góð mál beinan vegin, men hann verður skiftur út aftur stutt eftir, og tað haldi eg var eitt mistak.

– Teir fáa eina leiðslu upp á eini trý ella fýra mál í fyrra hálvleiki, og tað er ómetaliga tungt hjá okkum at koma upp á javnt aftur, og tað kostar nógvar kreftir. Í seinna hálvleiki gera vit eitt hav av feilum, og vit skora als ikki. Sjálvandi spælir málverjin hjá teimum ein fantastiskan dyst, men vit eiga at fáa fleiri mál, segði Jakob Jónsson.

Somuleiðis heldur íslendski veteranurin, at hugburðurin var eisini betur hjá VÍF.

– Teir vóru nógv meira klárir til dystin, enn vit vóru. Vit kunnu ikki koma við nøkrum umberingum, tí karmarnir vóru ílagi, dómararnir vóru góðir, so tað skerst ikki burtur, at betra liðið vann, segði Jakob Jónsson at enda.

Sámal Joensen, VÍF:

# – Vit vóru garvillir

**Ein av bestu monnum á vøllinum í Vestmanna mikukvøldið var Sámal Joensen hjá VÍF. Hann avdúkaði eftir dystin, at uppleggið hjá vestmenningum til dystin móti Kyndli var, at teir skuldu verða garvillir og berjast sum úlvar**

STEYPAPRÁT

*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*



*Sámal Joensen var ein brandur í verjuni hjá vestmenningum, og í hinum endanum skjeyt hann 8 mál. Hann fegnaðist um stríðsviljan hjá vestmenningum í hálvfinaluni*
*Mynd: Álvur haraldsen*

Hann skeyt ikki færri enn átta mál fyri VÍF, og samstundis var hann ein brandur í verjuni hjá vestmenningum, tá ið teir mikukvøldið vunnu sær sess í finaluni. Sámal Joensen prógvaði enn einaferð, at hann hevur ómetaliga stóran týdning fyri liðið hjá VÍF.

### Óvanligur gejstur

Sámal Joensen segði eftir dystin, at teir høvdu tikið sær um reiggj eftir dystin móti KÍF sunnudagin.

– Vit vóru orduliga tendraðir til dystin í kvøld. Eg haldi ikki, at eg nakrantíð hava upplivað slíkan gejst á VÌF-liðnum sum í kvøld, og tað gav eisini úrslit. Uppleggið undan dystinum var, at vit skuldu verða líka garvillir, sum kollfirðingar vóru, tá ið teir vunnu á okkum sunnudagin. Vit spældu tí hart og kontant, og tað loysti seg. Verjan hjá okkum spældi ein tann besta dystin leingi, og Dejan í málinum spældi sín lívs dyst, segði Sámal Joensen. Mótstøðuliðið hjá VÍF í finaluni verður StÍF, og tað er ikki fyrstu ferð.

– Man kann siga, at StÍF hevur verið marran hjá VÍF í steypakappingini í fleiri ár. Vit vunnu finaluna móti teimum í 1999, men taptu móti teimum í finaluni í 2001. Øll hini árini í hesum tíðarskeiði haldi eg, at tað eru strandingar, ið hava sligið okkum út, áðrenn komið hevur verið til finaluna, so teir hava verið ein plága hjá okkum í steypakappingini, staðfestir Sámal Joensen. Hann leggur afturat, at nú má tað verða nóg mikið, og at í ár eru tað vestmenningar, ið standa fyri tørni til at fara við steypinum.

– Eg ivist heldur ikki í, at hava vit sama gejst í finaluni, sum vit høvdu í kvøld, so vinna vit tann dystin eisini, segði Sámal Joensen at enda.

Neistin-Søljan 29-23 (14-11):

# Finaluplássið staðfest

**Samlaði sigurin hjá Neistanum var ongantíð í vanda, tá tær mikukvøldið leiktu seg fram til sína fyrstu steypafinalu í sjey ár**

COCA-COLA KAPPINGIN

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað sást greitt á áskoðarafjøldini, at talan ikki var um tann heilt stóra spenningin, nú Neistakvinnurnar fyri fyrstu ferð í sjey ár tóktust vísar í einum finaluplássi.

Talið av áskoðarum táttaði neyvan av álvara í tey 50, tá dysturin varð blástur ígongd, og tó at hesi øktust í tali, sum dysturin leið, so fingu tey ikki stórvegis spenning fyri peningin.

### Skjót avgreiðsla

Frá fyrsta bríksli var nevnliga greitt, at her skuldi ikki vera nakað stórvegis ivamál.

Hóast tryggu leiðsluna frá fyrra dystinum, so valdi Neistin frá fyrsta bríksli at mansverja útlendsku leikararnar hjá Stjørnuni. Antin skiftandi ella báðar í senn, og tað tók sum vera man broddin av álopsspælinum hjá gestunum.

At Neistin so samstundis sýndi nakað av tí besta álopsspælinum, sum tær hava havt í ár, gjørdi bara munin størri. Til tíðir gekk álopsspælið heilt skjótt, soleiðis at verjan hjá Stjørnuni varð spæld heilt tunn, so bæði skjúttar og strika hjá teimum bláu veruliga fingu dusað sær.

Eftir 13 minuttum var støðan soleiðis vorðin 8-1, og tó at Neistin nú slakaði, so kom spenningur ikki í samlaða úrslitið. Eina løtu eftir steðgin tóktist Søljan hava hug at skapa spenning um útfallið av hesum eina dystinum, men seinastu løtuna fall hamarin av álvara. Tað tóktist greitt, at orkan hjá vertunum var nakað væl betri, og so líðandi syrgdu tær fyri, at heldur ikki her skuldi nakar ivi verða.

### Sjey rak ár

Hvør mótstøðan í finaludystinum verður, var so ikki greitt undan evstamarki okkara. Men tað er einki at ivast í, at talan tá verður um eina munandi truplari uppgávu. Bæði Stjørnan og VB tykjast í øllum førum vera í einum flokki fyri seg í løtuni, men júst tann partin mundu tær í Neistanum ikki hugsað so nógv um mikukvøldið.

Fyrst og fremst, so kundu tær frøast um fyrsta finaluplássið í sjey ár. Tikið verður jú til, at eftir sjey rak ár koma sjey feit, og so er spurningurin, hvørt hetta skal takast sum tekin um, at gyltu tíðirnar hjá Neistanum nú aftur eru ávegis.

### Dysturin í tølukm

Neistin-Søljan 29-23 (14-11)

Neistin víðari við samanlagt 57-44

**Málskjúttar**

**Neistin:** Marjun Tróndarson 8(1), Simona Petersen 5, Ása á Neystabø 4, Annika Thomsen 4(3), Unn Kragesteen 3, Lív Sørensen 2, Mildrið Jacobsen 1, Lív Reynheim 1

**Søljan:** Nicoleta Radu Hansen 13(1), Lina Andriulyte 4, Herthe Simonsen 3, Heidi Maria Akselsen 2, Petra Thomassen 1

**Brotskøst:** Neistin 4, Søljan 2

**Útvísingar:** Neistin 1, Søljan 3

**Dómarar:** Eyðun Samuelsen & Andreas F. Hansen. Leiddu dystin uttan nevniverdar trupulleikar.

# Tjaldur kært dómara

**Hondbóltsfelagið Tjaldur í Runavík hevur kært annan av dómarunum, ið dømdi dystin millum bestu kvinnuliðini hjá Tjaldur og Kyndli í Runavík fyri góðari viku síðani**

HONDBÓLTSKÆRA

*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Tað er venjarin hjá kvinnuliðnum hjá Tjaldur, danin Henrik Daugaard, ið hevur sett eitt skriv saman, ið er sent til starvsnevndina og kappingarnevndina hjá HSF og til dómarafelagið.

### Kallaði venjaran býttan

Danski venjarin hjá Tjaldur vil verða við, at dómarin allan dystin á tamb dømdi til fyrimuns fyri Kyndil, hóast hin dómarin fleiri ferðir dømdi hinvegin. Vóru dómararnir ikki á einum máli um avgerðir, var tað allatíðina so, at dómarin, ið Tjaldur hevur kært, vann dómin, vil Henrik Daugaard verða við.

Venjarin hjá Tjaldur vil eisini verða við, at dómarin undir dystinum fleiri ferðir hugdi eftir sær, tá ið hann hevði dømt ivasamar dómar til fyrimuns fyri Kyndil, og danin sigur, at tað kendist óbehagiligt.

Harumframt vil Henrik Daugaard verða við, at tá ið hann tók í hondina á dómarunum eftir dystin, bar av. Danin greiddi umstrídda dómaranum frá sínum upplivingum undir dystinum, men til hetta hevði dómarin bert eina viðmerking, og tað var: "Du er så dum", vil danski venjarin hjá Tjaldur verða við í skrivi sínum til HSF og dómarafelagið. Hann krevur nú eina umbering frá dómaranum, og lagt verður afturat, at um viðkomandi dómari aftur skal døma Tjaldur, so verða videoupptøkur gjørdar av dystinum, so at heta møguliga kann nýtast sum prógv.

### Sita á málinum

Vit royndu til fánýtis at fáa eina viðmerking frá bæði starvsnevndini og kappingarnevndini hjá HSF hósmorgunin, men okkum eydnaðist tó at fáa fatur á Eyðun Samuelsen, ið situr í dómarafelagnum.

– Eg kann ikki siga stórvegis til hatta málið í løtuni, men eg kann siga so mikið sum, at vit sita á málinum í løtuni, og tað verður viðgjørt í næstum, sigur Eyðun Samuelsen.